# Húkurin skerjast – men ikki trolvinnan

**Meirilutin í fiskidaganevndini mælir í høvuðsheitum til at hækka dagatalið hjá partrolarum og trolbátum 10% - og at lækka dagatalið hjá skipum og bátum, sum fiska við húki, 10%, vinnuligu útróðrarmenninir í bólki 5 tó undantiknir. Minnilutin í fiskidaganevndini mælir til óbroytt dagatal fyri komandi fiskiár**



*Herfyri segði Jákup Reinert, fiskifrøðingur, sum umboðar Fiskirannsóknarstovuna í ICES, at gýtingarstovnurin á toski er rættiliga lítil – og næstan líka so lítil, sum hann var, áðrenn toskastovnurin "koksaði" fyrst í nítiárunum*

TILMÆLI
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Fiskidagarnir hjá húkavinnuni skulu skerjast, meðan dagarnir hjá trolvinnuni skulu økjast.

Hetta er í høvuðsheitum niðurstøðan hjá meirilutanum í fiskidaganevndini, sum í vikuni handaði landsstýrismanninum í fiskivinnumálum, Bjørn Kalsø, sítt tilmæli – eina viku eftir, at Fiskirannsóknarstovan kom við sínum tilmæli um fiskidagar.

Herta Olsen er skrivari í fiskidaganevndini.

- Høvuðstilmælini hjá meirilutanum eru, at dagatalið hjá skipum og bátum, sum fiska við húki í bólkunum, 3, 4 og 5, skal skerjast við 10%, meðan dagatalið hjá partrolarum í bólki 2 og trolbátum í bólki 4 skal økjast við 10%.

Hon leggur aftrat, at tilmælta skerjingin av húkaveiðini tó ikki skal ganga útyvir dagarnar hjá vinnuligu útróðrarmonnunum í bólki 5.

- Mælt verður til, at samlaða dagatalið í bólki 5 verður skert, men ikki hjá teimum sum reka vinnuligan útróður, sigur Herta Olsen.

Minnilutin í fiskidaganevndini mælir til óbroytt fiskidagatal og vísir í høvuðsheitum á, at fiskidagaskipanin er ein sjálvregulerandi skipan.

Í fiskidaganevndini er Óli Samró formaður. Hinir nevndarlimirnir eru; Bjarni Kass, sum umboðar partrolararnar, Dánjal J. Vilhelm fyri línuskipini, Jens J. Olsen fyri trolbátarnar og Auðunn Konráðsson, sum umboðar útróðrarmenninar.

Fyri hvønn av nevndarlimunum er ein eykalimur. Í minnilutanum eru Dánjal J. Vilhelm og Auðunn Konráðsson.

Sosialurin royndi í gjár at fáa fatur á tilmælinum hjá fiskidaganevndini, men tað eydnaðist ikki, áðrenn blaðið fór til prentingar.

## Endamálið at finna eina javnvág

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Í fjør mælti fiskidaganevndin til óbroytt fiskidagatal á landgrunninum, men eina 10% minking í dagatalinum á Føroyabanka. Somuleiðis mælti nevndin til, at Bankin verður friðaður í gýtingartíðini.

### Javnvág

Uppgávan hjá fiskidaganevndini, sum hesaferð hevur býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta, er at finna eina javnvág millum tað, sum fiskifrøðingarnir siga og tað, sum vinnan heldur um fiskastovnarnar.

Fiskifrøðingar eru samdir um, at veiðitrýstið er ov stórt í mun til gýtingarstovnarnar.

## Fiskifrøðingar mæla til stórar skerjingar

TILMÆLI
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Tilmælið frá Fiskirannsóknarstovuni um tosk, hýsu og upsa fyri fiskiárið 2005/2006 er hetta:

1. At fiskidagatalið hjá línuskipum, útróðarbátum við línu og snellu og lemmatrolarum við maskinorku undir 500 hk (Bólkur 3, 4 og 5) í 2005/2006 verður minkað við 30%, og í fiskiárinum 2006/2007 við øðrum 10%.
2. At serliga toska- og hýsukvotan hjá lemmatrolarum yvir 500 hk (Bólkur 1) verður tikin av.
3. At fiskidagatalið hjá partrolarum (Bólkur 2) í fiskiárinum 2005/2006 verður minkað við 15%, og í fiskiárinum 2006/2007 við øðrum 10 %.
4. At dagatalið á Føroyabanka verður minkað niður á árliga støðið í 1996-2002.
5. At serligu gýtingarfriðingarnar fyri tosk á landgrunninum, tosk á Føryabanka og upsa undir Føroyum eiga at halda fram

## Stór norðurlendsk innrás í Leirvík

VINABÝARSTEVNA
*Vilmund Jacobsen*

Í vikuskiftinum verður Norrøna Felagið í Leirvík vertur fyri stórari vinabýarstevnu, har eini 100 fólk fara at luttaka. Hetta er ein stevna, ið vinabýirnir, sum Leirvík hevur í Norðurlondum, skiftast um at hava – og í ár er tað so Leirvík, sum er vertur fyri stevnuni og mongu stevnugestunum.

Norðurlendski floytubólkurin, Nordanvind (mynd), sum er við á stevnuni, fer at hava tríggjar konsertir; í Leirvíkar kirkju fríggjakvøldið 24. juni klokkan 20, í kirkjuni í Mikladali leygardagin 25. juni kl. 14 og í Fuglafjarðar kirkju sunnukvøldið 26. juni kl. 21.



*Floytubólkurin, Nordanvind, fer at hava tríggjar konsertir á vitjanini í Føroyum*

SKEIÐSTOVAN KVASIR FARODANE

**Skeiðstovan KVASIR bjóðar**

**Skeiðrøðir í og aftaná summarfrítíðina**

**Skeiðrøðir í summarfrítíðini**

Til tey mongu, ið hava trupult við at finna tíð til at koma á skeið í vanligari arbeiðstíð, hava vit lagt tvær skeiðrøðir í summarfrítíðini. Onnur er til nýbyrjaran innan teldu, meðan hin er ein nýggj røð, ið hevur fingið heitið "Teldukoyrikort BASIS"

| | |
|---|---|
| 05/07 | **Lær at nýta teldu**<br>3 x kl. 13:30 - 16:30: 05/07+06/07+07/07 |
| 12/07 | **Lær at nýta tekstviðgerð**<br>3 x kl. 13:30 - 16:30: 12/07+13/07+14/07 |
| 19/07 | **Lær at nýta internet**<br>3 x kl. 13:30 - 16:30: 19/07+20/07+21/07 |

**Teldukoyrikort BASIS**

Sum nakað nýtt fara vit nú eisini at bjóða Teldukoyrikort BASIS. Hetta er eitt prógv, ið næmingurin kann fáa, eftir at hava staðið royndirnar, ið hoyra til 4 av skeiðunum, ið eru í tí vanliga teldukoyrikortinum. Vit skipa fyri hesi røðini í summarfríðtíðini, og tí verður møguligt at fáa hetta prógv eftir einans 3 vikum. Royndir verða skipaðar, so hvørt eitt skeið er liðugt.

| | |
|---|---|
| 04/07 | **Teldan og fíluskipan**<br>3 x kl. 09:00 - 12:00: 04/07+05/07+06/07 |
| 07/07 | **Grundskeið í tekstviðgerð v/MS Word**<br>4 x kl. 09:00 - 12:00: 07/07+08/07+11/07+12/07 |
| 13/07 | **Grundskeið í rokniarki v/MS Excel**<br>4 x kl. 09:00 - 12:00: 13/07+14/07+15/07+18/07 |
| 13/07 | **Grundskeið í internet og telduposti**<br>3 x kl. 09:00 - 12:00: 19/07+20/07+21/07 |

**Útbúgving til leiðaran**

Í heyst fer KVASIR nú eisini í samstarv við NOEA í Danmark at bjóða fram nakrar útbúgvingar, ið venda sær til leiðarar av ymiskum slag.

| | |
|---|---|
| 29/08 *-nýtt* | **Búskapur og fíggjarstýring fyri leiðarar**<br>6 x kl. 08:30 - 15:00: 29/08+30/08+26/09+27/09 +24/10+25/10 |
| 29/08 *-nýtt* | **Leiðsla í egnari fyritøku**<br>10 x kl. 15:30 - 22:00: 29/08+30/08+26/09 +27/09+24/10+25/10+14/11+15/11+12/12+13/12 |

Meira kunning um skeiðrøðirnar er at finna á heimasíðu okkara (sí www.kvasir.fo).

**KVASIR nøktar tín skeiðtørv innan telduskeið, grafisk skeið og menning.**